MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **5. februar 2015**
Tygara ref**.:**
Máltal**.: 14/00863-5**

**Løgtingsmál nr. xx/2014: Uppskot til løgtingslóg um stuðul til privatar fjølmiðlar**

**(Uppskot til)**

**Løgtingslóg**

**um**

**stuðul til privatar fjølmiðlar**

**§ 1.** Stuðul til privatar fjølmiðlar sbrt. hesi lóg kann eftir skrivligari umsókn til Mentamálaráðið latast prentaðum fjølmiðli, loftbornum fjølmiðli ella netmiðli, har hesir virka sum tíðindamiðil. Stuðulin kann latast sum útbreiðslustuðul og sum redaksjónsstuðul, sbr. tó §§ 2 og 3.
*Stk. 2.* Útbreiðslustuðul verður latin tíðindamiðli sum stuðul til beinleiðis skjalprógvaðar útreiðslur av blaðútbering og rakstri av sendineti í tann mun, at útbreiðslan í stóran mun viðvíkur framleiddum og ritstjórnaðum tilfari, sum er lagað til fólkið í Føroyum, og sum lýsir føroysk samfelagsviðurskifti, ella útlendsk viðurskifti úr einum føroyskum sjónarhorni.
*Stk. 3.* Redaksjónsstuðul verður latin til beinleiðis skjalprógvaðar lønarútreiðslur, ið standast av einari redaksjón, sum í stóran mun framleiðir og ritstjórnar tilfar, sum er lagað til fólkið í Føroyum, og sum lýsir føroysk samfelagsviðurskifti, ella útlendsk viðurskifti úr einum føroyskum sjónarhorni.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kunnar almenningin um møguleikan at søkja um stuðul og ásetir freist fyri at søkja um stuðul. Landsstýrismaðurin ger serligt oyðublað til umsókn av stuðli sbrt. hesi lóg.
*Stk. 5.* Stuðul sbrt. hesi lóg kann bert verða latin fyri eitt álmanakkaár í senn.

*Treytir fyri stuðli*

**§ 2.** Stuðul sbrt. hesi lóg kann ikki latast fjølmiðlum, hvørs ognarskapur heilt ella lutvíst er almennur. Stuðul kann harumframt ikki latast løgfrøðiligum persónum, hvørs samlaði rakstur við 50% ella meiri er fíggjaður av almennum stuðli, harímillum av lógarheimilaðum inntøkufíggjaðum virksemi.

**§ 3.** Stuðul sbrt. § 1 er treytaður av, at fjølmiðilin í mestan mun sjálvstøðugt ber fram journalistiskt viðgjørt tilfar. Tíðindi, sum í stóran mun bera brá av endurtøkum av eitt nú gerandishendingum ella viðmerkingum til kjak, verða ikki mett sum sjálvstøðugt journalistiskt viðgjørt tilfar.
*Stk. 2.* Umframt treytina fyri stuðli sbrt. stk. 1 er stuðulin treytaður av, at fjølmiðilin
1) er ein sjálvstøðugur miðil við einum ábyrgdarhavandi blaðstjóra ella ritstjóra,
2) umframt blaðstjóran ella ritstjóran í minsta lagi hevur eitt ársverk á redaksjónini,
3) ikki er fíggjaður við 50% ella meiri frá arbeiðsgevarafelagsskapi, arbeiðstakarafelagsskapi ella øðrum vinnugreinafelag og
4) hevur tíðindainnihald, sum í stóran mun er ritstjórnað tilfar við eitt nú greinum av serliga politiskum, samfelagsligum ella

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

mentanarligum slag  og viðgerðum av aktuellum fjølmiðlatilfari.
*Stk. 3.* Umframt tær í stk. 1 og 2 nevndu treytir skal prentaður fjølmiðil fyri at fáa útbreiðslustuðul í stóran mun vera landsfevnandi, og fjølmiðilin skal gevast út minst einaferð um vikuna.
*Stk. 4.* Umframt tær í stk. 1 og 2 nevndu treytir skal loftborin fjølmiðil fyri at fáa útbreiðslustuðul hava lógligt atgeingi til sendinet, sum røkkur í minsta lagi til 50% av landsins íbúgvum.
*Stk. 5.* Útbreiðslustuðul og redaksjónsstuðul kann í mesta lagi vera 40% av teimum í § 1, stk. 2 og 3 nevndu útreiðslunum árið fyri,  at umsóknin er latin Mentamálaráðnum, tó kann stuðulsupphæddin í hægsta lagi vera kr. 200.000,00 til blaðútbering, 150.000,00 kr. til sendinet  og kr. 500.000,00 fyri redaksjónsstuðul, sbr. § 9.

**§ 4.** Umsøkjari skal saman við umsóknini skjalprógva, at treytirnar fyri stuðli sbrt. §§ 2 og 3, og at treytir sbrt. reglum við heimild í hesi lóg, eru loknar.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin verður heimilaður við kunngerð at áseta nærri reglur um, nær ein fjølmiðil er at meta sum ein sjálvstøðugur miðil sbrt. § 3, stk. 2, nr. 1, útrokningargrundarlag fyri útreiðslum sbrt. § 1, stk. 2 og 3, krøv til umsóknina, útgjald av stuðli, roknskap, grannskoðan, treytir og útgjald av stuðli annars.

*Miðlastuðulsnevndin*

**§ 5.** Landsstýrismaðurin setir eina Miðlastuðulsnevnd at gera sær tilmæli um, hvør umsøkjari kann fáa stuðul, og hvussu nógvan stuðul ein fjølmiðil kann fáa.
*Stk. 2.* Miðlastuðulsnevndin verður tilnevnd av landsstýrismanninum eftir tveimum tilmælum frá Felagnum Føroysk Miðlafólk sum umboð fyri føroyska miðlaheimim, og einum tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya. Fyri hvønn lim verður valdur tiltakslimur eftir somu reglum.
*Stk. 3.* Limir og tiltakslimir verða valdir fyri trý ár og kunnu í mesta lagi sita í tvey skeið á rað.
*Stk. 4.* Nevndin skipar seg sjálv. Er nevndin ikki samd um val av formanni, velur landsstýrismaðurin, hvør av teimum trimum vanligu limunum skal vera formaður.

**§ 6.** Miðlastuðulsnevndin er viðtøkufør, tá ið allir limir eru møttir. Miðlastuðulsnevndin velur skrivara millum limir sínar at gera fundarfrágreiðing.
*Stk. 2.* Formaðurin ger fundarskrá og kallar nevndina skrivliga inn til fundar til at viðgera umsóknir og at gera tilmæli til landsstýrismannin í seinasta lagi eina viku eftir, at freistin sbrt. § 1, stk. 4 er farin.
*Stk. 3.* Fundarskráir, fundarfrágreiðingar, tilmæli v.m. skulu latast landsstýrismanninum í seinasta lagi seks vikur eftir, at freistin at søkja stuðul er farin.

**§ 7.** Eftir tilmæli frá Miðlastuðulsnevndini tekur landsstýrismaðurin endaliga avgerð innan fyrisitingina.

*Útrokningargrundarlagið*

**§ 8.** Stuðul sbrt. hesi lóg verður roknaður í mun til játtanina til endamálið á fíggjarlógini og tær samlaðu árligu útreiðslurnar sbrt. § 1, stk. 2 og 3. Nevndu útreiðslur verða gjørdar upp við støði í áteknaða roknskapinum undanfarna roknskaparár.
Landsstýrismaðurin ásetir, hvussu samlaða játtanini til endamálið á fíggjarlógini verður býtt millum ávikavist útbreiðslustuðul til blaðútbering, útbreiðslustuðul til sendinet umframt redaksjónsstuðul.

*Roknskapur og eftirlit*

**§ 9.** Stuðulsmóttakari skal í sambandi við umsóknina lata inn roknskap við átekning frá grannskoðara fyri skjalprógvaðar útreiðslur sbrt. hesi lóg fyri undanfarna roknskaparár.

*Stk. 2.* Stuðulsumsøkjari skal upplýsa um øll viðurskifti, sum kunnu elva til, at stuðulsgrundarlagið verður lækkað.
*Stk. 3.* Mentamálaráðið kann krevja stuðulsgrundarlagið nágreiniligari lýst og krevja innlit í skjøl hesum viðvíkjandi.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann krevja stuðul heilt ella lutvíst rindaðan aftur, um fjølmiðil í sambandi við umsókn sína hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella fjølmiðil í sama sambandi hevur tagt burtur týðandi upplýsingar, ella fjølmiðil ikki lýkur treytirnar annars fyri stuðli.
*Stk. 5.* Øll krøv eftir hesi lóg kunnu, saman við innkrevjingarkostnaði, verða innheintað við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum í skattalógini fyri innkrevjing av skattum.

*Gildiskoma*

**§ 10.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2015 fyri útreiðslur í 2014.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

Í løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 hevur Løgtingið samtykt at seta av játtan til miðlastuðul til privatar miðlar at søkja, so skjótt neyðugt lógargrundarlag er fingið til vega.
Lógaruppskotið er gjørt út frá hesi fortreyt og skal sbrt. fíggjarlógartekstinum fevna um at stuðla útbreiðslu av fjølmiðlatilfari og at stuðla redaktionellum arbeiði.

Landsstýrismaðurin í mentamálum varðar av fjølmiðlunum og hevur sum fremsta mál á fjølmiðlaøkinum at vera við til at tryggja borgarunum og samfelagnum dygdargott og álítandi miðlainnihald. Eyðsýnt er, at tess størri útboðið av miðlum er, tess størri verður margfeldið.

Eitt fjøltáttað miðlalandslag er við til at birta upp undir eitt opið og fólkaræðisligt samfelag, men tað er ikki ein sjálvfylgja, at vit hava eitt fjølbroytt úrval av fjølmiðlum. Seinastu mongu árini hava føroysku fjølmiðlarnir havt trupul kor at virka undir, og úrslitið hevur verið færri miðlar og færri útgávur. Politiskt ynski er um at venda gongdini, so tað ber til hjá verandi og møguliga fleiri miðlum at virka á marknaðinum, og í hesum sambandi er gjørt av, at privatu miðlarnir skulu kunnu søkja miðlastuðul eftir nærri ásettum treytum. Kringvarp Føroya, sum verður fíggjað við kringvarpsgjaldi v.m., og aðrir alment fíggjaðir miðlar skulu ikki kunna søkja um stuðul.

Privatu miðlarnir eru við til at geva almenna public service-stovninum Kringvarpi Føroya eina neyðuga og ynskiliga kapping, sum er við til at tryggja dygdargott innihald.

Víst kann verða á álitið *Betri miðlar* frá 2011, sum viðgjørdi føroyska miðlalandslagið í síni heild og hevði ymisk tilmæli um ábøtur. Í álitinum verður stórur dentur lagdur á eitt fjølbroytt fjølmiðlalandslag:

“Miðlarnir eru ikki einans umráðandi fyri einstaka borgaran. Miðlarnir hava eisini ein meira umfatandi og víðfevndan týdning og ávirkan á gerandisdagin, politikk, búskap og samfelagið í síni heild. Fólkaræðið er eisini neyvt tengt at, hvussu miðlaskipanin í einum landi er sett saman. Fólkaræðið í sær sjálvum er ómetaliga fjølbroytt, og tí hevur tað eisini týdning, at teir miðlar, ið

samfelagið stuðlar, eru fjølbroyttir í formi og innihaldi. Við einum fjølbroyttum miðlaúrvali verður leikvøllurin fyri sjálvstøðugari hugsan víðkaður umframt, at borgararnir støðugt læra at nýta kritiskan hugsanarhátt. Fjølbroytt eigaraviðurskifti tryggja eisini, at fleiri røddir koma framat og verða hoyrdar (Baker: 2007; Dwyer: 2010). Tí snýr miðlapolitikkur seg um, hvussu grundleggjandi rættindi sum kunningar- og talufrælsi kunnu varðveitast og mennast. Hesi rættindi eru nær tengd at, hvussu fríir og fjølbroyttir miðlarnir í einum samfelagi eru. Givið er, at miðlarnir kunnu vera við at styrkja evnini hjá borgarunum at virka í samfelagnum, og at miðlarnir tryggja føroyingum upplýsingar um fólkaræðisliga orðaskiftið."

*Betri miðlar* mælti eisini til at veita stuðul til miðlarnar, tó var útgangsstøðið eitt annað, har miðlastuðul eftir ávísum leisti skuldi latast til nærri ásett endamál.

Løgtingið hevur samtykt at játta 2 mió. kr. til privatu miðlarnar, og við hesum lógaruppskoti verður ein leistur skotin upp fyri, hvussu játtanin kann verða býtt út.

Dentur verður í uppskotinum lagdur á, at stuðulin skal kunna veitast tíðindamiðlum, hvørs redaktionella innihald í stóran mun er kritiskur journalistikkur og kunning um aktuel føroysk samfelagsviðurskifti og viðgerð av viðkomandi útlendskum ella altjóða viðurskiftum úr einum føroyskum sjónarhorni. Tíðindamiðlarnir skulu vera gróðrarbotnur undir einum upplýstum og virknum almennum kjaki.

Meginendamálið við at veita redaksjónsstuðul er at tryggja, at tilfar, ið verður givið út ella almannakunngjørt er redaktionelt viðgjørt og eftirkannað. Harumframt er endamálið at birta upp undir eina álítandi tíðindamentan, sum ger, at brúkararnir við vissu kunnu lesa, síggja og hoyra tíðindi við trúvirði.

Prentaðir fjølmiðlar og loftbornir fjølmiðlar kunnu umframt redaksjónsstuðul søkja um útbreiðslustuðul eftir ávísum treytum. Stuðulin skal verða við til at tryggja eitt breitt útboð av miðlum og tíðindaflutningi til frama fyri eitt fjøltáttað vav og innihald í fjølmiðlaflutninginum. Talan kann vera um stuðul til sendinet og til útbering av bløðum.

Føroyar eru eins og londini kring okkum fyri stórari ávirkan uttaneftir, og heimligu miðlarnir eru í harðari kapping við ein alsamt meir altjóðagjørdan miðlaheim. Í hesum miðlaveruleika ræður um at tryggja eitt sterkt samlað føroyskt miðlaútboð við eini føroyskari rødd.

Samanumtikið er miðlastuðulin eitt átak til frama fyri einum fjølbroyttum føroyskum miðlalandslagi, sum gagnar samfelagsligu og fólkaræðisligu menningina.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

**Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar**
Uppskotið verður mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri landið, tí peningur skal setast av til stuðul, og peningur skal av játtanini hjá Mentamálaráðnum til Miðlastuðulsnevndina. Uppskotið hevur jaligar fylgjur fyri fjølmiðlavinnuna, ið nú fær høvi at søkja stuðul.

**Umsitingarligar avleiðingar**
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri Mentamálaráðið, ið skal viðgera tilmælini frá Miðlastuðulsnevndini.

**Umhvørvisligar avleiðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær umhvørvisligar avleiðingar.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Hoyring**
Hesir partar hava fingið lógaruppskotið til hoyringar:

**Bløð:**
Dimmalætting
Norðlýsið
Sosialurin
Sp/f Media

**Kringvarpsstøðir:**
Kringvarp Føroya
Lindin
Rás 2

**Portalar:**
dimma.fo
in.fo
oyggjatidindi.fo
portal.fo
sandportal.fo
sosialurin.fo
sudurras.fo
ting.fo
tórsportal.fo
vágaportal.fo

**Feløg og stovnar:**
Fíggjarmálaráðið
Fróðskaparsetur Føroya
Føroysk Miðlafólk
Kappingarráðið
Løgmansskrivstovan
Miðlahúsið
Starvsmannafelagið
TAKS
Vinnumálaráðið

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

*Til § 1*
Bløð, dagbløð og tíðindabløð  eru at meta sum prentaður miðil í lógarinnar høpi. Fyri at søkja útbreiðslustuðul skal fjølmiðilin hava beinleiðis útreiðslur í sambandi við blaðútgávu og/ella av sendineti. Fjølmiðlar kunnu harumframt søkja redaksjónsstuðul fyri lønarútreiðslurnar av einari redaksjón. Talan skal vera um redaksjonelt starvsfólk.

Harumframt er tað ein treyt, at útbreiðslan í stóran mun viðvíkur framleiddum og ritstjórnaðum tilfari, ið er lagað til føroysk viðurskifti, ella sum lýsa útlendsk viðurskifti úr  føroyskum sjónarhorni.

Redaksjónsstuðul kann latast til lønarútreiðslur, ið standast av einari redaksjón, og redaksjónin í stóran mun framleiðir ritstjórnað tilfar, ið er lagað til føroysk viðurskifti, ella sum lýsir útlendsk

viðurskifti úr føroyskum sjónarhorni. Allur stuðul sambært lógini er treytaður av, at umsøkjari lýkur ásetingarnar í §§ 2 og 3.

Tá ið søkt verður um stuðul er formkravið, at umsóknin við øllum viðkomandi skjølum og upplýsingum verður latin Mentamálaráðnum innan eina nærri ásetta freist, sbr. stk. 4.

*Til § 2*
Lógin fevnir um privatar fjølmiðlar. Í hesum sambandi má tað almenna ikki hava nakran lut í ognarskapinum, og miðilin má heldur ikki vera stuðlaður av løgfrøðiligum persóni, t.e. eitt nú almennum partafelag, almennum stovni ella øðrum, hvørs samlaði rakstur við 50% ella meiri er fíggjaður av almennum stuðli, harímillum av lógarheimilaðum inntøkufíggjaðum virksemi.

*Til § 3*
Treytin um sjálvstøðugt viðgjørt journalistiskt tilfar skal metast í mun til samlaða innihaldið hjá avvarðandi fjølmiðli. Í Danmark er minstamarkið 1/6 av samlaða innihaldinum. Hetta mark kann brúkast sum vegleiðandi fyri fjølmiðlarnar í Føroyum. Henda treytin er eitt nú lokin, um talan er um framleiðslu, har miðilin hevur tikið stig til avtalu við fríyrkisfólk til brúk í avvarðandi miðli.

Sum dømi kann nevnast, at greinar, sum fríyrkisfólk hava skrivað sbrt. bílegging frá og avtalu við avvarðandi fjølmiðil til brúk fyri útgávu í avvarðandi miðli, verða mettar at vera fevndar av hugtakinum "sjálvstøðugt" viðgjørt tilfar. Sama er galdandi fyri fast tilknýttar teknarar, sum framleiða tilfar av serligum slag.

Harafturímóti verða endurtøkur av gerandishendingum og viðmerkingar til kjak ella annað tílíkt ikki mettar at vera sjálvstøðugt journalistiskt viðgjørt tilfar.

Fjølmiðilin skal vera ein sjálvstøðugur miðil við ábyrgdarhavandi blaðstjóra/ritstjóra, og fjølmiðilin skal harafturat í minsta lagi hava eitt ársverk í starvi á blaðstjórnini. Miðilin má ikki verða fíggjaður við 50% ella meiri frá arbeiðsgevarafelagsskapi, arbeiðstakarafelagsskapi ella øðrum vinnugreinafelag fyri at tryggja ávíst óheftni, og miðilin skal í stóran mun sjálvstøðugt blaðstjórna tilfar við eitt nú greinum av serliga politiskum, samfelagsligum ella mentanarligum slag og viðgerðum av aktuellum fjølmiðlatilfari.

Útbreiðslustuðul verður latin prentaðum miðli og loftbornum miðli. Við *landsfevnandi* verður mett, at prentaði miðilin verður útgivin í minst helvtini av landinum, og prentaði miðilin skal verða útgivin minst einaferð um vikuna.

Tá ið talan er um loftbornan fjølmiðil skal hesin hava lógligt atgeingi til eitt sendinet, sum í minsta lagi røkkur 50% av landsins íbúgvum. Loftborin fjølmiðil skal í minsta lagi hava dagligar sendingar vanligar yrkadagar.

Redaksjónsstuðul verður latin til fjølmiðlar, ið lúka tær vanligu treytirnar í §§ 2 og 3, stk. 1 og 2, nr. 1-4.

Tað ber til at søkja allar stuðulsmøguleikarnar. Útbreiðslustuðul, sum er ávikavist stuðul til blaðútbering og sendinet, umframt redaksjónsstuðul til fjølmiðil kann í mesta lagi vera tilsamans

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

40% av samlaðu árligu útreiðslunum til ávikavist blaðútbering og rakstur av sendineti ella lønarútreiðslunum til redaksjónina árið fyri, at umsóknin er latin Mentamálaráðnum. Tó kann árligi stuðulin í hægsta lagi vera kr. 200.000,00 til blaðútbering, 150.000,00 kr. til rakstur av sendineti og kr. 500.000,00 fyri redaksjónsstuðul. Evsta markið er fyri at tryggja eitt fjøltáttað fjølmiðlalandsslag.
Tað eru sostatt hesi hægstu mørk fyri stuðli:

- Ein fjølmiðil, sum einans er ein netmiðil, kann í mesta lagi fáa 500.000,00 kr. í redaksjónsstuðli.
- Ein fjølmiðil, sum gevur eitt prentað blað út, kann afturat redaksjónsstuðlinum fáa útbreiðslustuðul til blaðútbering ella í mesta lagi 700.000,00 kr. í stuðli.
- Ein fjølmiðil, sum umframt blaðútgávu eisini hevur loftbornan tíðindaflutning í útvarpi, kann fáa útbreiðslustuðul til sendinet ella eina samlaða stuðulsupphædd, sum í mesta lagi er 850.000,00 kr.

Sí eisini ásetingina í § 8, hvussu stuðulin verður roknaður.

*Til § 4*
Ásetingin setir nøkur innihaldslig krøv til umsøkjaran. Eitt nú skal umsøkjarin saman við umsóknini til Mentamálaráðið skjalprógva, at treytirnar fyri stuðli sbrt. §§ 2 og 3 eru loknar, eins og hann eisini skal skjalprógva, at møguligar aðrar treytir við heimild í lógini eru loknar. Hóast tær týðandi høvuðstreytirnar fyri stuðli eru við í lógini, heimilar stk. 2 landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um, nær ein fjølmiðil er at meta sum sjálvstøðugur miðil sbrt. § 3, stk. 2, nr. 1, útrokningargrundarlagið fyri redaksjonellu útreiðslunum, innihaldið í umsóknini, útgjaldið av stuðli, roknskap, grannskoðan, treytir og útgjald av stuðlinum annars.

*Til § 5*
Lógargreinin ásetir, at landsstýrismaðurin skal seta eina Miðlastuðulsnevnd, sum hevur ein tilmælandi leiklut, sum skal vera støði undir endaligu avgerðini hjá landsstýrismanninum um, hvør og hvussu nógv ávísir umsøkjarar kunnu fáa í stuðli. Metingin hjá nevndini skal altíð vera ítøkilig.

Miðlastuðulsnevndin verður tilnevnd av landsstýrismanninum. Felagið Føroysk Miðlafólk ger tvey tilmæli um vanligar limir og tvey tilmæli um varalimir, og Fróðskaparsetur Føroya ger tilmæli um ein vanligan lim og varalim. Nevndin skipar seg sjálv. Um nevndin ikki er samd um vali av formanninum, ger landsstýrismaðurin hetta av.

*Til § 6*
Nevndin skal vera fullmannað við trimum limum, áðrenn hon er viðtøkufør. Nevndin hevur til uppgávu at viðgera innkomnar umsóknir um stuðul. Nevndin kann hava fleiri fundir, og hon skal gera fundarfrágreiðing eftir hvønn fund. Formaðurin hevur ábyrgdina av at gera fundarskrá og at kalla inn til fundar. Sami fundur kann skipast yvir fleiri dagar uttan at fundarskrá skal gerast í hvørjum einstøkum føri. Fyrsti fundur skal tó í seinasta lagi vera eina viku eftir, at freistin at søkja um stuðul er farin, og endaliga tilmælið skal í seinasta lagi vera liðugt seks vikur eftir nevndu freist. Alt tilfarið verður síðani latið landsstýrismanninum. Endamálið við nevndini er at tryggja landsstýrismanninum møguleikan at taka avgerð á einum upplýstum grundarlagi frá sakkønum fólki.

*Til § 7*
Hóast nevndin er tann sakkøna og ger tilmæli um stuðul, er tað landsstýrismaðurin, ið tekur endaligu avgerðina. Tann avgerðin skal lúka allar fyrisitingarligar meginreglur um eitt nú upplýst grundarlag, grundgeving, sakligheit, proportionalitet v.fl.

*Til § 8*
Roknskaparupplýsingar skulu hava grannskoðaraátekning. Stuðulsupphæddin verður roknað í mun til játtanina til endamálið á fíggjarlógini og tær samlaðu árligu útreiðslurnar hjá tí einstaka umsøkjaranum. Nevndin skal hyggja at teimum útreiðslum, sum eru beinleiðis knýttar at framleiðsluni av redaksjonellum innihaldi hjá viðkomandi fjølmiðli. Somuleiðis skal nevndin hyggja at beinleiðis útreiðslum til ávikavist blaðútbering og rakstur av sendineti. Landsstýrismaðurin býtir samlaðu játtanina, sum er til endamálið á fíggjarlógini, í 3 puljur: 1) útbreiðslustuðul til blaðútbering, 2) útbreiðslustuðul til rakstur av sendineti og 3) redaksjónsstuðul.

Stuðulin verður roknaður soleiðis, at tann einstaki umsøkjarin fær lutfalsligan part av stuðulsheimilaðu útreiðslunum, innan fyri ta upphædd, sum er í puljuni til tað einstaka stuðulsslagið. Tó soleiðis, at stuðulin í mesta lagi er 40% av stuðulsheimilaðu útreiðslunum og innan fyri hægst møguligu stuðulsupphæddirnar, sum ásett í § 3, stk. 3.

*Til § 9*
Stuðulin verður latin fyri útreiðslur, sum fjølmiðilin hevur havt árið fyri stuðulsárið. Í sambandi við umsóknina skulu stuðulsheimilaðu útreiðslurnar í roknskapinum váttast við átekning frá grannskoðara.

Um treytir fyri stuðli ikki eru loknar, verður heimilað landsstýrismanninum at krevja stuðul heilt ella lutvíst afturrindaðan. Tað kann vera, um fjølmiðlin í sambandi við umsókn sína hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella fjølmiðlin í sama sambandi hevur tagt burtur týðandi upplýsingar, ella fjølmiðil ikki lýkur treytirnar fyri stuðli.

Øll krøv hjá tí almenna sbrt. hesi lóg verða við innkrevjingarkostnaði innheintað við panting, og tað er TAKS, sum fremur innkrevjingina eftir reglunum í skattalógini fyri innkrevjing av skattum.

*Til § 10*
Áseting um gildiskomu, men lógin fær afturvirkandi virknað frá 1. januar 2015.

Mentamálaráðið, xx. februar 2015

Bjørn Kalsø
landsstýrismaður

/Poul Geert Hansen